# Kapitalistiska reformasjón í fis

## - Tankar, eftir at hava hildið framløgu á Vinnudegnum 2008



*- Er føroyska húgvan bara til pynt? spurdi Hermann Oskarsson í framløgu síni á Vinnudegnum fríggjadagin. Hann heldur, at tað nationala hevur ov stóra ávirkan á búskapin og samanbar Føroyar við eina bygd við sum umframt fáu sethúsini hevur ein handil, kirkju fiskavirki goe itt fiskifar, sum liggur við bryggjuna*

*Tekning: Hermann Oskarsson*

KRONIKKUR
*Hermann Oskarsson*



Ofta er tað soleiðis, aftan á at man hevur hildið eina framløgu, fingið nøkur væl meint herðaklapp fyri verkið og práta við áhoyrarnar á veitsluni aftaná – at tá nústaðni finnur man út av, hvat man veruliga skuldi havt sagt.

Her kemur tí eitt eftirstroyggj eftir vinnudagin sjálvan.

### Bygdin

Føroyskur vinnupolitikkur er rikin eftir einum búskaparligum myndli, sum hvørt mannsbarn í landinum fekk í vøggugávu.

Myndilin er sára einfaldur og stendur tí eisini krútsterkur.

Føroyar eru at líkna við eina lítla bygd. Niðri í fjøruni millum høg grøn fjøll liggur bygdin, sum umframt fáu sethúsini hevur ein handil (bygdahandilin, sum vit øll kenna hann), kirkju, fiskavirki og eitt fiskifar, sum liggur við bryggjuna í sólskininum.

Tá nógvur fiskur er at fáa, og tá fiskaprísirnir eru høgir, tá blomstrar bygdin. Manningin tjenar væl, og konurnar hava fullan arbeiðsdag á virkinum. Handilin gongur framúr væl í slíkum tíðum. Kommunan fær ráð at asfaltera og hampa um kirkjugarðin og skúlan. Petrina ger sær frisørsalong í kjallaranum.

Øvugtan veg gongur í ringum fiskiárum, og tá fiskaprísirnir eru lágir. Handilin fánar burtur, vegirnir eru ófantaligir at koyra eftir, skúlin stendur ómálaður og hømiliða vexur í kirkjugarðinum. Petrina gevst at klippa og krúlla.

Og soleiðis rekur aftur og fram. Men tað, sum drívur alt verkið er fiskiskapurin, eins og vatnið sum fær mylnuhjólið at mala. Tankin um at gera eitt perpetuum mobile – eitt ævinligt gonguverk – burtur úr hesum, er ikki so fjarur.

Tí tá tað gongur illa í fiskivinnuni – kann man so ikki spræna pengar inn í hana, so at hon líkasum kann halda lívið í restini? Altso, um tað er so, at alt hitt verður drivið fram av fiskivinnuni, so kann man jú bara skorða hana av í ringum tíðum. So koma ongantíð ringar tíðir, oder was?

Handilin og frisørsalongin í kjallaranum hjá Petrinu geva ikki sama íkast til bygdalívið, sum fiskiskipið og fiskavirkið. Heldur ikki vegarbeiðið hjá kommununi. Tey standa ikki á beinunum einsamøll, og soleiðis uppfata vit í bygdini tað eisini – vit hava bara eitt bein at standa á. Fiskivinnuna.

### Illusjónin

Men hetta er alt samalt ein illusjón. Ein nasjonal misskiljing av samanhanginum.

Tað, sum vit av sonnum áttu at lært av myndlinum er hetta, at tað er fiskivinnan, sum sendir skelkir av konjunkturum gjøgnum bygdina. Allar hesar afturvendandi, men stuttlívaðu periodur av feitum árum og rakum árum, koma frá fiskaútflutninginum.

Vit eru so stuttlívað, at vit síggja grasið vaxa og følna, men vit síggja ikki træið vaxa. Vit síggja konjunkturarnar sveiggja aftur og fram, men vit síggja ikki búskapin vaxa.

### Tøknilig menning

Fyri at síggja tað, mugu vit broyta myndlinum.

Fyrsta myndin er, at vágin er avtakin við sluppum, sum liggja fyri íla. Inni á landi er fjøran øll sum hon er ruddað og lagað til fiskaturking. Har stendur eitt ilt av eini kirkju, men eingin skúli, eingin handil og eingin frisørur. Vegirnir eru av mold og eyri, dunnuskræpu og seyðasparli.

Næsta myndin er ein snotulig bygd. Eitt einstakt stásiligt stálskip liggur við bryggju, sum bæði fiskar og framleiðir fiskin a einum hátøkniligum arbeiðsdekki. Uppi á loftinum á fiskavirkinum er fiskasølan, sum ikki bara selur fiskin frá hesum skipinum, men fisk, sum ongantíð sæst við føroyskar strendur. Á sama lofti húsast ein fyritøka, sum mennir nýggja siglitøkni til suðurhavsins stóru mastodontar. Uppi í bygdini er handilskjarni. Petrina er langt síðgivin at klippa, men døturnar hava fitnessclub í handilskjarnanum. Í einum av neystunum húsast ein internetfyritøka, sum hevur ment altjóða portalar við informasjón um alt sum hevur við fisk, ost og vín at gera.

Hvat er hent millum myndirnar báðar?

Tøknilig menning og aftur tøknilig menning.

Fyrst í fiskiskapinum. Skilagóð marknaðarlig fiskiveiðiskipan hevur latið tøkniligu menningina í siglitøkni, fiskitøkni og organisasjón, rudda slóð fyri kapping millum reiðaríini. Í dag fiskar hetta eina stálskipið fýra ferðir so nógv, sum øll vágin full av sluppum fiskaði fyri 100 árum síðan. Fiskavirkið framleiðir álítandi trygt til tann marknað, sum søludeildin røkir.

So nógv fólk er farið úr fiskivinnuni, at við fleirfaldum fólkatali, er rúm fyri at framleiða so óluksáliga nógv annað – sumt til útflutnings og sumt til at søta heimalívið við.

### Nøgd og effektivitetur

Nú tú hevur lisið seinna myndilin, átti tú at havt lært munin á teimum. Men lat meg greiða frá muninum kortini.

Munurin er, at í fyrra myndlinum fekk illusjónin okkum at gera nakrar tollutar niðurstøður. Illusjónin um, at alt ræður um fiskivinnu.

Tað tóktist, sum at tað ráddi um at varðveita so nógv skip sum gjørligt og at fiska og tilvirka so nógv sum gjørligt. Gekk tað illa, so mátti fyri alt í verðini einki ilt henda fiskiskipunum og fiskavirkinum, tí so fór alt í hundarnar. Tað ráddi eisini um at varðveita arbeiði á fiskavirkinum til so nógvar hendur sum gjørligt.

Í seinna myndlinum er niðurstøðan ein onnur, tí har er tøkniligi og marknaðarligi framburðurin avgerandi. Í hesum førinum ræður um at lata húsagang raka tey fiskifør og tey virki, sum ikki